LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Runavíkar Kommuna
Postbox 139
Heiðavegur 26
610 Saltangará

Tórshavn, tann 5. november 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/09468-87
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina og reglugerðina hjá Runavíkar kommunu í sambandi við tillutan av grundstykkjum

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðina hjá Runavíkar kommunu í sambandi við, at ein borgari søkti um grundstykki. Umboðsmaðurin helt, at kommunala reglugerðin fyri tillutan av grundstykkjum var ikki nóg greið, og kommunan hevði at sýna til í tveimum førum ikki hildið egnar mannagongdir í sambandi við tillutan av kommunalum grundstykkjum. Hetta hevði at sýna til ført við sær ólíka viðgerð av borgarum. Umboðsmaðurin gav Runavíkar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina av umsókn klagarans, herundir fyri ikki at hava eina nóg greiða reglugerð fyri tillutan av kommunalum grundstykkjum, fyri viðgerðina av eini innlitsumbøn frá klagaranum og fyri ikki at hava givið klagaranum svar til skrivligu fyrispurningar hansara innan rímiliga tíð. Umboðsmaðurin heitti á Runavíkar kommunu um beinanvegin at dagføra og eftirmeta reglugerðina fyri tillutan av kommunalum grundstykkjum.*

## 2. Málslýsing

Við skrivi, dagfest tann 9. apríl 2024, sendi A umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "...
> *Fari at biðja umboðsmannin hyggja uppá okkara mál/samskifti við Runavíkar Kommunu. Vit halda okkum vera gjørd fyri mismuni av Runavíkar Kommunu, umframt vantandi svar og kunning yvirhøvur.*
> *Málið snýr seg í stuttum um, at vit, tann 28. apríl 2023, skrivaðu okkum upp til grundstykki í Runavíkar kommunu og betaltu eitt depositum áljóðandi kr. 20.000,-*
> *Vit ringdu eftirfylgjandi javnan til Runavíkar kommunu (nýttar ikki at skriva, tey svara næstan ongantíð) fyri at frætta, hvussu útlitini vóru fyri einum grundstykki í B. Tá vit ringdu til Runavíkar kommunu, var svarið frá ...(starvsfólki í kommununi, mín viðm.), at kommunan hevði ætlanir við teimum grundstykkjum, sum vit vístu á, ella at tey akkurát vóru seld. Tey grundstykkini, sum, sambært ...(starvsfólki í kommununi, mín viðm.), vóru seld í maimánaði 2023, eru ikki tinglýst í øðrum navni enn.*

*Eftir at hava samskift nakrar ferðir við ..(starvsfólk í kommununi, mín viðm.) fingu vit illgruna um, at onkur mótvilji var ímóti okkum, tí bóðu vit um at fáa innlit í grundstykkjalistan, og hvussu mannagongdirnar vóru viðv. útlutan av grundstykkjum í Runavíkar Kommunu. Ongar mannagongdir vóru lýstar á heimasíðuni hjá Runavíkar Kommunu, einans at møguligt er at skriva seg upp, og gjaldast skal kr. 20.000,- í depositum.*
*Eftir at hava rykt Runavíkar Kommunu eftir svari uppá innlit vóru boðini, at grundstykkini vóru útlutað eftir grundstykkjalistanum, og at hann ikki var almennur. ...*

*...Vit sendu eftirfylgjandi tveir teldupostar til ...(starvsfólk í kommununi, mín viðm.) (tann 25/8-23 og 16/10-2023) fyri at frætta um útlitini, men fingu ongantíð nakað svar frá ...(starvsfólki í kommununi, mín viðm).*

*Ringdi aftur til Runavíkar Kommunu tann 19-10-2023 fyri at vita, um gongd var í málinum viðv. útlutan av grundstykki B. Hetta bleiv tíverri ein sera skuffandi telefonsamrøða við...(starvsfólk í kommununi, mín viðm.). Vit fingu at vita, at okkara ætlan helst var spekulatión, og at vit skuldu rinda ein hægri kostnað enn aðrir borgarar, tí vit eiga hús í Runavíkar Kommunu.*

*Fleiri borgarar, sum hava fingið útlutað grundstykki í B, eiga bústað í Runavíkar kommunu frammanundan, og tí føla vit okkum fyri mismuni. Vit hava fingið skrivligt prógv frá borgarum, sum eiga bústað í Runavíkar kommunu frammanundan, at tey hava goldið tann vanliga kostnaðin fyri síni grundstykki í B, og ikki tann hægra kostnaðin ....*

*Vit hava ongantíð fingið svar uppá okkara teldupostar, har vit gera vart við mismunin, sum kommunan fremur ímóti okkum.*
*Tann 08-03-2024 fingu vit útlutað eitt grundstykki til ein hægri kostnað enn aðrir borgarar í Runavíkar kommunu. Vit hava skrivað til Runavíkar Kommunu og gjørt vart við okkara ónøgd.*

*Runavíkar Kommuna hevur ongantíð svarað okkum uppá mismunin, sum vit halda tey fremja ímóti okkum...”*

Viðløgd klaguni vóru avrit av teldupostsamskifti millum klagaran og Runavíkar kommunu, umframt onnur viðkomandi skjøl í málinum.

Í skjølunum sást, at klagarin, tann 28. apríl 2023, sendi Runavíkar kommunu umsókn um grundstykki.

Tann 1. mai 2023 sendi Runavíkar kommuna klagaranum móttøkuváttan.

Tann 24. mai 2023 sendi klagarin Runavíkar kommunu teldupost, har hann vísti á eina røð av grundstykkjum, hann var áhugaður í.

Tann 6. juni 2023 sendi klagarin aftur Runavíkar kommunu teldupost, har hann vísti á ávís grundstykki, hann var áhugaður í.

Eftir at klagarin frá Runavíkar kommunu hevði fingið upplýst umvegis telefonsamrøðu, at tey grundstykki, hann var áhugaður í, ikki vóru tøk longur, sendi klagarin, tann 13. juni 2023, Runavíkar kommunu teldupost, har hann vísti á eitt annað grundstykki, hann var áhugaður í.

Tann 20. juni 2023 sendi klagarin Runavíkar kommunu, umframt ávísum starvsfólkum í kommununi, teldupost, har millum annað stóð:

*"...*

*Eftir fleiri fyrispurningar eftir grundstykki í B er okkara niðurstøða tann, at tað er sera trupult at fáa hendur á einum grundstykki í B, hetta hóast lítið er bygt, og fleiri grundstykki enn standa skrásett hjá Runavíkar kommunu.*
*Eg havi spurt eftir:*
*Matr. nr. ...*

*Matr. nr...*

*Í báðum førum er upplýst, at stykkini eru farin.*
*Seinasta roynd var matr. ... Eg veit, at hetta grundstykkið hevur áður verið bjóðað út. Men upplýst varð nú, at kommunan hevur onkra ætlan við matr. nr. (fýra ymisk matrikel, mín viðm.)*
*Tí fari eg at loyva mær at spyrja um innlit:*
*1. Hvussu verða grundstykkini útlutað, og hvussu eru útlitini fyri, at eitt grundstykki stendur okkum í boði?*
*2. Hvørja ætlan hevur kommunan við matr. nr. (fýra ymisk matrikel, mín viðm.)?*

*..."*

Tann 20. juli 2023 sendi klagarin Runavíkar kommunu teldupost, har hann minti kommununa á, at hann ikki hevði fingið svar til teldupostin, sum hann sendi kommununi, tann 20. juni 2023.

Tann 27. juli 2023 sendi Runavíkar kommuna klagaranum soljóðandi teldupost:

*"...*

*Vísandi til spurning 1*
*So verða stykkini útlutað eftir grundstykkjalistanum, tvs. í teirri raðfylgju, sum umsóknirnar koma inn.*
*Tað kann kanska vera misvísandi á heimasíðuni, hvørji stykki eru tøk. Frá tí at stykkið er bjóðað keyparanum, gongur tað eitt sindur av tíð, til skeytið er endaliga avgreitt og tinglisið. Í onkrum føri verða hesi viðurskifti ikki avgreidd, og tá verður stykkið sett aftur á sølulista.*

*Vísandi til spurning 2*
*So hevur kommunan avgjørt at taka hesi stykkini av sølulistanum fyribils til eina møguliga kommunala verkætlan, sum ikki er komin nakran veg enn, og tí fáa vit ikki sagt nakað um hetta enn.*

*Grundstykkjalistin er ikki almennur, og tí verður innlit ikki givið í hann.*
*..., sum umsitur grundstykkjasølurnar, er í feriu og verður aftur til arbeiðis... Um tit hava fleiri spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til hansara, tá hann verður aftur til arbeiðis..."*

Tann 25. august 2023 sendi klagarin Runavíkar kommunu enn ein teldupost, har hann vísti á eina røð av grundstykkjum, hann var áhugaður í.

Tann 16. oktober 2023 sendi klagarin aftur Runavíkar kommunu enn ein teldupost, har hann vísti á eina røð av grundstykkjum, hann var áhugaður í.

Tann 19. oktober 2023 sendi klagarin Runavíkar kommunu soljóðandi teldupost:

*"...*

*Vísandi til telefonsamrøðuna, tann 19-10-2023, ...*
*Vit hava sent fleiri teldupostar uppá fyrispurning um grundstykki í B:*
*Teldupostar sendir:*
*24-05-2023*
*06-06-2023*
*13-06-2023*
*25-08-2023*
*16-10-2023*
*Vit hava einki svar fingið uppá teldupostarnar, sum vit hava sent til tín. Vit hava nú í longri tíð spurt eftir einum grundstykki í B, men aftaná telefonsamrøðuna í dag, hava vit kensluna av, at kommunan hevur onkran mótvilja at luta okkum stykki, av tí at vit frammanundan hava ein bústað í kommununi.*
*Skulu tí undirstrika beinanvegin, at fleiri av teimum, sum hava fingið útlutað stykki í B, eiga hús frammanundan í Runavíkar kommunu. Fleiri húseigarar í Runavíkar kommunu hava takkað nei til stykki, sum tey hava fingið bjóðað í B.*
*Fólk, sum hava bygt sær hús á grundstykkið, ið er keypt frá Runavíkar kommunu, hava eisini fingið bjóðað grundstykki í B.*
*Virkiseigarar hava fingið grundstykki frá kommununi til vinnuliga bygging áður, umframt stykki í B til privata bygging. Hesir eru eisini húseigarar frammanundan.*
*Hetta vita flest allir borgarar her í økinum, og tí undrar tað okkum, at tú sigur teg ikki vita um hetta. Tí var eg (A) ikki sørt skuffaður at práta við teg, har spurnartekin varð sett við okkara støðu og ætlan við einum grundstykki í B. Hetta er grovur mismunur á borgarum í Runavíkar kommunu.*
*Sum áður nevnt/nú eisini uppá skrift, so er ætlanin at búgva í húsinum. Tað verður í øllum førum skattaborgarar, sum koma at búgva í húsinum- nú eru vit forhoyrd, og svar er givið.*
*Hetta eru helst fleiri upplýsingar, enn hvat omanfyri standandi borgarar hava givið.*
*Vit ynskja at fáa eitt endaligt svar uppá okkara møguleikar viðv. Útlutan av einum grundstykki í B.*
*Vit hava goldið eitt depositum, men um vit eru útilokað, so er eingin orsøk at hava peningin standandi.*
*So okkara vón er: 1. Sakliga viðgerð av málinum. 2. Eitt aftursvar..."*

Tann 20. november 2023 sendi klagarin ávísum starvsfólkum í Runavíkar kommunu teldupost, har hann gjørdi vart við somu viðurskifti, sum í teldupostinum, sum klagarin sendi kommununi tann 19. oktober 2023.

Tann 17. desember 2023 sendi klagarin enn eina ferð Runavíkar kommunu sama teldupost, sum klagarin sendi Runavíkar kommunu tann 20. november 2023.

Tann 16. februar 2024 sendi Runavíkar kommuna klagaranum teldupost viðheft raðfestingarlista, kort yvir útstykkingina og soljóðandi bræv:

*"...*
*Tað eru 5 grundstykkir eftir, sum ikki eru seld í útstykkingini í B.*
*Stykkini verða útlutað til tey, sum standa ovast á grundstykkjalistanum til útlutingina hesaferð, soleiðis, at nr. 1 á listanum velur fyrst, síðani nr. 2, síðani nr. 3 o.s.v.*
*Tygum/tit verða einans tikin við í útlutanini av stykkjum, sum tygum/tit hava raðfest á raðfestingarlistanum.*
*Á heimasíðuni hjá Runavíkar kommunu undir "Bygging– ... " er ein lýsing av teimum einkultu stykkjunum og byggitreytum í økinum.*

*Kostnaður fyri stykkini er kr. 750,00 pr. m2 umframt kr. 20.000 fyri felags facilitetir og kr. 16.000 fyri rottanga, sum er grivin niður á stykkinum og íbundin høvuðskloakkina.*
*Hava tygum/tit fingið eitt kommunalt grundstykki áður, ella talan er um bygging til víðari sølu/leigu, er kostnaðurin fyri grundstykkir í B kr. 1.125,00 pr. m2. Tygum skulu, saman við raðfestingarlistanum, senda kommununi eina váttan frá peningarstovni uppá fígging av grundstykkinum.*
*Tá tygum hava fingið játtað eitt ávíst grundstykki, verður skeyti skrivað, og skal keypsupphæddin gjaldast innan 14 dagar, eftir at skeytið er undirskrivað.*
*Upplýsast skal, at byggingin skal verða byrjað innan tvey ár, og skulu húsini verða liðug innan 3 ár, eftir at skeytið er tinglýst.*
*Raðfestingarlistin skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 04.03.2024.*
*Hjálagt er:* *
*raðfestingarlisti*
* *kort yvir útstykkingina..."*

Tann 21. februar 2024 sendi klagarin Runavíkar kommunu soljóðandi teldupost:

*"...*
*Takk fyri, at vit sleppa at vera við í útlutanini av grundstykkjum í B.*
*Viðheft er raðfestingarlisti og váttan um fígging frá peningastovni av grundstykkinum.*
*Vit sendu kommununi skriv áðrenn jól, men vit fingu ongantíð svar upp á okkara teldupost.*
*Men við hesum so rokna vit sjálvandi við, at vit eru hoyrd og javnstillað við aðrar borgarar, sum hava fingið útlutað grundstykki í B.*
*Vinarliga vátta fyri móttøku av hesum telduposti..."*

Tann 8. mars 2024 sendi Runavíkar kommuna klagaranum teldupost, har millum annað stóð:

*"...*
*Tygum/tit eru nr. 4 á grundstykkjalistanum, og verður val tygara/tykkara nr. 1, sum er grundstykki..., tillutað tygum/tykkum, vísandi til treytirnar í skrivinum, sum í tykkara føri verður kr. 1.125,00 pr. m2..."*

Tann 9. mars 2024 sendi klagarin Runavíkar kommunu teldupost, har klagarin vísti til teldupostin, sum hann sendi kommununi tann 17. desember 2023. Viðfest vóru myndir av samskifti við aðrar borgarar um prís og avrit av skeyti hjá øðrum borgara, ið vísti, at prísurin var 750,00 kr. pr. m2. Eisini var viðfest soljóðandi skriv, dagfest 9. mars 2024, til Runavíkar kommunu:

*"...*
*Viðvíkjandi útlutan av grundstykkjum í B.*
*Takk fyri útlutaða grundstykkið.*
*Sum áður greitt frá, so ynskja vit at verða viðfarin sum aðrir borgarar í Runavíkar kommunu.*
*Vit tosa javnan við borgarar, sum hava fingið grundstykki í B, og duga tí illa at síggja, hvør munurin er á okkum viðv. útlutan av grundstykki. Vit halda, at hetta er mismunur á borgarum í Runavíkar kommunu.*
*...*
*Nú hava vit í longri tíð víst á, at kommunan fremur mismun, og tí eru vit aftur farin í holt við at tosa við borgarar, sum eiga grundstykki í B. Vit hava vent okkum til teir borgarar,*

*sum áður hava fingið útlutað kommunalt grundstykki og/ella eiga sethús frammanundan í Runavíkar kommunu. Eingin av teimum borgarum, sum vit tosað við, hava ella kenna nakran, sum hevur fingið grundstykki í B bjóðað áljóðandi kr. 1.125,00 pr. m2.*
*Vísandi til treytirnar í brævi, sent til A, mál E. So kann upplýsast, at fleiri grundstykki hava verið tinglýst meira enn 3 ár í B. Sethús verða leigað út, og fleiri leigumál eru ávegis, tá húsini standa liðug.*
*...*

*Vit fara við hesum at biðja um somu treytir sum aðrir borgarar í Runavíkar kommunu...*
*Við vón um sakliga og seriøsa viðgerð av málinum, har vit verða viðfarin sum allir aðrir borgarar í Runavíkar kommunu...”*

Tá klagarin onki hoyrdi aftur frá Runavíkar kommunu, sendi hann umboðsmanninum eina klagu.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 11. apríl 2024 varð klagan send Runavíkar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi tríggjar vikur. Samstundis varð Runavíkar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl og skjalayvirlit í málinum, umframt avrit av reglugerð/mannagongd fyri tillutan og prísáseting av kommunalum grundstykkjum.

Tann 3. mai 2024 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

*“...*
*Vísandi til klagu frá A, dagf. 9. apríl 2024, í samband við útlutan av grundstykki í útstykkingini í B.*
*Fyrst av øllum skulu vit umbera, at A ikki hevur fingið svar uppá umbøn/fyrispurning uppá grundstykki, sum hann hevur spurt um. Málsviðgerðin, sum hevur sitið við grundstykkjum hjá Runavíkar kommunu, er ikki í starvi longur – ...*
*Annars er at siga, at grundstykkini í Runavíkar kommunu ikki verða seld fyri kostprís, men fyri ein lægri kostnað, enn útstykkingin í veruleikanum kostar. Soleiðis hevur altíð verið, og er prísurin ásettur av býráðnum.*
*Seinnu árini hava onkrar vinnufyritøkur keypt kommunal grundstykkir at byggja hús á til víðari sølu og harvið fáa “vinningin” av, at kommunan selur grundstykkini fyri ein lægri kostnað enn útveganarkostnaðin, og borgarin/keyparin harvið ikki fær hendan ágóðan, sum er ætlaður honum.*
*Fíggjarnevndin og Byggi- og býarskipanarnevndin hava tí tikið málið um sølu av grundstykkjum til vinnufyritøkur til viðgerðar á fundi 28/3-2022, og varð niðurstøðan tann, at vinnufyritøkur skulu gjalda fullan útveganarkostnað fyri grundstykkini.*
*Hesir prísir eru galdandi fyri útstykkingarnar í Saltangará, Skála og Rituvík, tá talan er um víðarisølu.*
*Rituvík 750,-/m2 (annars 575,-/m2)*
*Skála 900,-/m2 (annars 575,-/m2)*
*Saltangará 1.125,-/m2 (annars 750,-/m2 umframt 20.000 fyri felags fasilitetir og 16.000 fyri septiktanga).*

*Støðan hjá A og D er tann, at tey í 2016 hava fingið tillutað grundstykki í B, har tey hava bygt hús, og tí ikki tikin við, tá talan er um vanliga grundstykkjalistan, men undir treytum fyri vinnustykki, við bygging og sølu ella leigu fyri eyga.*

*Uppá fyrispurning frá málsviðgerðanum verður í telduposti til hansara m.a. sagt soleiðis: Sum áður nevnt og nú eisini uppá skrift, so er ætlanin at búgva í húsinum. Tað verður í øllum førum skattaborgarar, sum koma at búgva í húsinum.*
*Hendan útsøgnin* <u>*Tað verður í øllum førum skattaborgarar, sum koma at búgva í húsinum,*</u> *kundi eisini bent á, at talan er um sølu/leigu– Altso bygging av 2 sethúsum í kommunalari útstykking í B.*
*Vísandi til spurningin um reglugerð/mannagongd fyri útlutan og prísáseting av kommunalum grundstykkjum er at siga, at kommunan hevur eina reglugerð (viðheft). Øll hava møguleika at seta seg upp á listan til grundstykki, og verða stykkini útlutað eftir dagfesting, nær umsóknin er innkomin, og depositum goldið. Hendan mannagongd hevur altíð verið fylgd.*
*Úrrit frá viðtøku frá fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini 28/3-2022:*
*Verða stykkir seld vinnufyritøku til bygging av sethúsum e.l., er kostnaðurin metti útveganarkostnaðurin hjá kommununi.*
*...”*

Viðfest teldupostinum var avrit av soljóðandi reglugerð fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu:

*“...*
*Reglugerð fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu*
*1. Frá 1. januar 2002 skulu allar umsóknir til grundstykkjalistan verða skrivligar*
*2. Umsóknin verður send Teknisku Nevnd til kunningar og sett á grundstykkjalistan eftir móttøkustemplinum*
*3. Fyri at verða settur á listan, skal umsøkjarin vera*
- *fyltur 18 ár*
- *ikki eiga kommunalt ella privat grundøki í Runavíkar kommunu*

*4. Umsøkjari, ið stendur fremst á listanum fær fyrst boðið grundøki við lutakasti millum stykkini*
*5. Umsøkjari, sum sambært grundstykkjalistanum fær boðið kommunalt grundøki, men ikki hevur møguleika at taka av tilboðnum, kann, um hann ynskir tað verða standandi á grundstykkjalistanum, men verður hann settur aftast í røðini av teimum nøvnum, sum standa á listanum tann dagin avboðið kemur. – Hetta kann tó bert gerast einaferð, og verður umsøkjarin strikaður av listanum, um hann ikki tekur av aðru ferð*
*6. Nevndu reglur verða at galda fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu, og verða stýrdar umsitingarliga*
*7. Møgulig frávik frá reglunum kunnu bert góðtakast, tá talan er um serstakar grundir, og skal Tekniska Nevnd í hvørjum einstøkum føri góðkenna hesi”*

Tann 6. mai 2024 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum umbidnu skjølini í málinum.

Sama dag sendi umboðsmaðurin klagaranum kunning um at lata sær møguligar viðmerkingar til frágreiðingina frá Runavíkar kommunu við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 7. mai 2024 sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar til frágreiðingina frá Runavíkar kommunu. Klagarin vísti millum annað á, at tey høvdu samskift við høvuðspostkassan hjá kommununi alt 2024, uttan at hava fingið nøktandi svar til sínar spurningar. Klagarin fýltist eisini á, at kommunan uttan nøktandi grundarlag hevði gjørt sær sínar egnu meiningar og metingar og lagt tey undir spekulatión. Klagarin førdi millum annað soleiðis fram:

*"...*
*Vit (D og A) eru privatir persónar, og ikki ein juridisk eind, sum eitt nú vinnufyritøkur. Vit eru privatir borgarar, sum mugu fyrihalda okkum til tað, sum tað nú einaferð inniber. Eftir okkara meting so kann umsitingin ikki bólka okkum sum eina vinnufyritøku – alt eftir, hvat passar best til teirra prógvførslu.*
*Sum kunning skal nevnast, at vit hava ikki fingið tillutað grundstykki í nýggju útstykkingini í B...*

*Úrrit frá viðtøku hjá frá fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini 28/3-2022:*
*Verða stykkir seld vinnufyritøku til bygging av sethúsum e.l., er kostnaðurin metti útveganarkostnaðurin hjá kommununi.*
*Talan er um vinnufyritøkur, og ikki privat personar!*

*Annað:*
*Vit hava fleiri ferðir víst á, at Kommunan longu selur grundstykkir til borgarar í Runavíkar kommunu, sum eiga ein bústað framanundan í Runavíkar kommunu, og hava hesir borgarar goldið kr. 750,-/m2, umframt 20.000 fyri felags fasilitetir og 16.000 fyri septiktanga. Kommunan hevur ikki svarað okkum uppá hendan mismunin, sum verður sýndur okkum. ...*
*..."*

Tann 10. mai 2024 sendi umboðsmaðurin Runavíkar kommunu viðmerkingarnar frá klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 18. mai 2024 bað Runavíkar kommuna umboðsmannin um longda freist.

Tann 21. mai 2024 játtaði umboðsmaðurin Runavíkar kommunu longda freist, harumframt setti umboðsmaðurin Runavíkar kommunu soljóðandi uppfylgjandi spurningar:

*"...*
*Umboðsmaðurin vil tó minna á, at Runavíkar kommuna í viðmerkingum sínum fyriheldur seg serliga til hesi punkt í viðmerkingum klagarans:*

- *At Runavíkar kommuna uttan at hoyra klagara hevur mett, at umsókn klagarans um grundstykki í B bendir á sølu og útleigan fyri eyga, hóast klagari stendur sum privatpersónur á umsóknini, og tí hevur bólkað umsókn klagarans sum vinnufyritøku.*
- *Vísandi til avrit av sms-boðum og skjeyti, sum eru at finna í skjølunum, sum Runavíkar kommuna hevur sent umboðsmanninum, er greitt, at ein viðkomandi hevur keypt eitt grundstykki fyri 750 kr. pr. m2. Persónsupplýsingar eru fjaldir í skjølunum. Ber til hjá Runavíkar kommunu at siga umboðsmanninum, um talan er um sølu til privatpersón ella vinnufyritøku, um viðkomandi eigur eitt grundstykki frammanundan, og um henda søla er farin fram innan ella eftir tann 28. mars 2022?*

  *Harumframt ynskir umboðsmaðurin, at Runavíkar kommuna svarar hesum uppfylgjandi spurningum:*
- *Hevur Runavíkar kommuna verið í samskifti við Løgmálaráðið um sølu av grundstykkjum í B fyri undir kostprís?*
- *Ber til hjá Runavíkar kommunu at senda umboðsmanninum eitt yvirlit yvir sølu av grundstykkjum í B eftir tann 28. mars 2022, ella at siga umboðsmanninum, hvørji av grundstykkjunum í B eru seld eftir tann 28. mars 2022, hvønn stykkini eru seld til og fyri hvønn fermeturprís?..."*

Tann 11. juni 2024 minti umboðsmaðurin Runavíkar kommunu á at gera viðmerkingar til viðmerkingarnar frá klagaranum, umframt at svara uppfylgjandi spurningunum.

Tann 17. juni 2024 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar til viðmerkingarnar frá klagaranum, umframt svar til uppfylgjandi spurningarnar:

> *"...*
> *Fyrst orsaka at vit ikki hava svarað, áðrenn freistin var úti 12/6-2024, hetta vegna feriu og arbeiðsbyrðu, og hava vit tíverri ikki biðið um longda freist samsvarandi.*
> *Svar til:*
> *Pkt. 1: er at viðmerkja, at umsøkjararnir longu hava fingið tillutað grundstykkið í B og bygt sethús fyri fáum árum síðan. Hóast talan ikki er um seinastu útstykkingina, so er talan um keyp av kommunalum grundstykki í B.*
> *Pkt. 2: Tað sæst ikki, hvat grundstykki talan er um, sum spurt verður um. Men talan er ikki um vinnufyritøku. Tað einasta, sum er selt vinnufyritøku í seinastu útstykkingini, eru stykkini omanfyri vegin .... Tað stykki er eitt stórt samanhangandi stykki, sum varð útboðið fyri seg og ætlað til íbúðir í fleiri hæddum.*
> *Eitt stykkið varð selt í norðaru útstykkingini í 2002, og hesi hava keypt stykki í nýggju útstykkingini. Tey hava selt stóru húsini og keypt og bygt minni ... hús á grundstykkið – Kanska er tað hetta, sipað verður til.*
> *Pkt. 3: Kommunan hevur fylgt gamlari siðvenju um ikki at selja grundstykkini fyri kostprís, men at tilluta stykkini eftir grundstykkjalistanum (eftir dato fyri nær umsóknin er innkomin) og hevur uppá fyrispurning um seld grundstykkir upplýst og sent Løgmálaráðnum lista við seldum grundstykkjum og fyri hvønn prís, stykkini eru seld..."*

Viðfest teldupostinum var avrit av reglugerð fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu, umframt yvirlit yvir grundstykkir í B, ið vóru seld aftaná 28. mars 2022.

Tann 19. juni 2024 sendi umboðsmaðurin klagaranum viðmerkingarnar frá Runavíkar kommunu við einari freist áljóðandi 14 dagar. Umboðsmaðurin bað eisini klagarin um at senda nærri upplýsingar um tey dømi hann hevði víst á, og hvussu hesi vóru í somu støðu sum klagarin.

Tann 19. juni 2024 sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar til frágreiðingina frá Runavíkar kommunu. Klagarin førdi millum annað fram:

> *"...*
> *Sum vit áður hava greitt frá, so síggja vit ikki mun á okkum og teimum borgarum, sum hava fingið útlutað stykki í B - ...*
> *...*
> *T.v.s at D og A eru fyrstu privat persónar í Runavíkar kommunu sum skulu bólkast sum vinnufyritøku í B – Hetta er grovur mismunur á borgarum í Runavíkar kommunu – ....*
> *...*
> *Tað undrar okkum, at Runavíkar kommuna ikki leggur allar upplýsingarnar fram fyri umboðsmanninum (allar persónarnar, sum eiga hús/stykki, áðrenn tey fingu útlutað grundstykki í B). Hetta eigur Runavíkar kommuna at vita.*
> *Vit vita eisini væl, hvønn talan er um viðv. norðara stykki. ...Viðkomandi eigur húsini enn, sambært umvørvisstovuni. (t.vs. 2 hús á kommunala útstykking). Og vit vita eisini, at ... ætlar at selja eldru húsini, og at ... hevur bygd eini minni hús í nýggju útstykkingini. Hetta eru helst sertreytir, sum viðkomandi hevur fingið í mun til okkum. Viðkomandi seldi ikki húsini, áðrenn ... fekk útlutað eitt grundstykki! Aftur her sigur man bara hálvan sannleika.*

> *Okkara hús eru eisini stór og liggja norðan fyri nýggju útstykkingina – so okkara støða er tann sama!*
> *...*
> *Sigast skal, at húsini hjá F helst akkurát eru seld – men hetta broytur einki uppá mannagongdina/raðfylgjuna av útlutanina av grundstykkinum í B. Antin eigur tú eini hús/grundstykki, ella eigur tú ikki eini hús.*
> *Hvat ynskir kommunan? Her er talan um sølu av sethúsum, bygd á kommunala útstykking frá 2002, helst kastar hetta eisini vinning av sær. Nær er tað í ordan at selja síni hús? Í veruleikanum eru umstøðurnar hjá viðkomandi persónum okkum óviðkomandi, men vit verða forvirraði av øllum treytinum, sum opinbart, bara eru galdandi fyri okkum, og ti nevna vit hesar støðurnar.*
> *...*
> *Vit ynskja grundstykki eftir somu treytum sum okkara samborgarar. Vit kenna umstøðurnar og práta við fólk í økinum, men vita ikki hvat "agendan" hjá Runavíkar Kommunu er viðv. okkum og hesum málinum! So hvørt sum kommunan úttalar seg, gongur tað meira upp fyri okkum, hvussu grovt hetta í veruleikanum er! ...”*

Viðfest teldupostinum vóru eisini umbidnar upplýsingar um borgarar í Runavíkar kommunu, sum høvdu fingið grundstykki útlutað í B og sum áttu ein bústað/grundstykki frammanundan í Runavíkar kommunu.

Tann 20. juni 2024 sendi klagarin umboðsmanninum eitt dagført yvirlit yvir borgarar, sum klagarin metti, høvdu fingið tillutað grundstykki í B, meðan tey enn áttu aðra fasta ogn. Klagarin vísti eisini á annað dømi, har ein borgari hevði fingið boðið at keypa grundstykki til lægra prísin, hóast borgarin átti hús á kommunalari útstykking.

Tann 1. juli 2024 sendi umboðsmaðurin Runavíkar kommunu viðmerkingarnar frá klagaranum til viðmerkingar við einari freist áljóðandi 12. august 2024. Harumframt setti umboðsmaðurin millum annað Runavíkar kommunu soljóðandi spurning:

> *“...*
> *Harumframt hevur klagari víst á, at Runavíkar kommuna útlutar stykkir í B til privatpersonar, sum hava fingið útlutað kommunalt grundstykki áður, sum hava keypt sær ein bústað í Runavíkar kommunu, ella sum eiga fleiri bústaðir í Runavíkar kommunu.*
> *Klagari hevur í hesum sambandi sent umboðsmanninum ein lista yvir hesar borgarar. Listin verður hervið eisini sendur tykkum til kunningar.*
> *Umboðsmaðurin ynskir, at Runavíkar kommuna gevur umboðsmanninum eina frágreiðing um hetta og um, hvussu støðan hjá klagara skilir seg frá støðuni hjá borgarunum á listanum.*
> *Í reglugerðini fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu er millum annað ásett, at umsøkjarar ikki skulu eiga kommunalt ella privat grundøki í Runavíkar kommunu fyri at verða settir á grundstykkjalistan.*
> *Umboðsmaðurin ynskir eina nærri frágreiðing um, hvussu hetta skal skiljast.*
> *Í frágreiðingini, sum tit sendu umboðsmanninum, tann 3. mai 2024, er úrrit frá viðtøku frá fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini, tann 28. mai 2023.*
> *Umboðsmaðurin ynskir at fáa alla fundargreiðingina frá fundinum...”*

Tann 10. juli 2024 bað Runavíkar kommuna umboðsmannin um longda svarfreist, sum umboðsmaðurin játtaði.

Tann 1. august 2024 sendi Runavíkar kommuna soljóðandi viðmerkingar umframt svar til spurningarnar frá umboðsmanninum:

> *"...*
>
> *Vísandi til teldupost tykkara niðanfyri, er viðheft viðtøkan frá fíggjarnevndini frá fundi 22/3-2022*
> *Vísandi til yvirlitið frá A og D um grundstykkir, sum eru útlutaði til persónar, sum áttu hús í kommunalari útstykking framman undan, er at siga, at tað bert er F, sum hevur keypt grundstykki frá kommununi í kommunalari útstykking áður (keypt í 2002) og sum hevur selt húsini og keypt grundstykki í nýggju útstykkingini í B.*
> *Øll hini á viðhefta lista hava keypt hús frá øðrum sum hava bygd húsini – t.v.s., at tey hava ikki sjálvi fingið útlutað kommunalt grundstykki áður..."*

Tann 29. august 2024 kunnaði umboðsmaðurin klagaran og Runavíkar kommunu um, at umboðsmaðurin nú fór undir endaliga viðgerð av málinum.

Tann 30. august 2024 ringdi umboðsmaðurin til Runavíkar kommunu fyri at fáa nágreinað, hvussu ásetingin í reglugerðini skuldi skiljast, og sendi eftirfylgjandi Runavíkar kommunu soljóðandi teldupost:

> *"...*
>
> *Vísandi til telefonsamrøðu okkara fyri løtu síðani.*
> *Eg spurdi teg, um talan einans er um, at umsøkjari ikki má eiga grundstykki, tá hann søkir, ella um hann heldur ikki má eiga aðra fasta ogn, tvs. hús.*
> *Tú greiddi frá, at tað er munur á, um talan er um kommunalt ella privat grundstykki/fasta ogn.*
>
> - *Eigur umsøkjari annaðhvørt grundstykki, sum er keypt kommunalt, ella hús, sum umsøkjari hevur latið byggja á kommunalt keypt grundstykki, tá søkt verður um nýtt kommunalt grundstykki, kann umsøkjari ikki fáa útlutað nýtt kommunalt grundstykki.*
>
> - *Eigur umsøkjari grundstykki, sum er keypt privat í fríðari sølu, tá søkt verður um kommunalt grundstykki, kann umsøkjari ikki fáa útlutað kommunalt grundstykki.*
>
> - *Eigur umsøkjari hinvegin eini privat hús, sum umsøkjari antin hevur keypt sum liðugt bygd hús, ella sum umsøkjari hevur latið byggja á privat keypt grundstykki, tá søkt verður um kommunalt grundstykki, kann umsøkjari fáa útlutað kommunalt grundstykki.*
>
> *Tú greiddi harumframt frá, at grundgevingin er tann, at tá man hevur keypt privata fasta ogn, betalir man alt sjálvur. Er ognin hinvegin keypt kommunalt, betalir man ikki fullan kostprís. Tú segði, at har er innbygdur stuðul, og at tann stuðulin kann man bara fáa einaferð.*
> *Kanst tú vátta fyri mær, at omanfyristandandi er rætt skilt?*
> *Um ikki, so vinarliga lat mær tínar viðmerkingar innan 2 vikur..."*

Tann 5. september 2024 váttaði Runavíkar kommuna fyri umboðsmanninum, at endurgevingin í teldupostinum var rætt skilt.

Tann 9. september 2024 spurdi umboðsmaðurin Runavíkar kommunu, hvørt tað var rætt skilt, at vinnufyritøkur gjalda 1.125,00 kr. fermeturin fyri eitt kommunalt grundstykki.

Tann 23. september 2024 sendi umboðsmaðurin Runavíkar kommunu soljóðandi teldupost:

> *"...*
>
> *Sambært klagara, hevur G, sum eigur fasta ogn frá Runavíkar kommunu, aftur fingið boðið grundstykki í Runavíkar kommunu, men tók ikki av tilboðnum.*
>
> *Umboðsmaðurin ynskir eina frágreiðing um hetta, herundir nær og hvar viðkomandi hevur fingið boðið grundstykki, og til hvønn kostnað.*
> *Harumframt ynskir umboðsmaðurin avrit av tilboðnum og tí samskifti, sum annars hevur verið í hesum sambandi.*
>
> *Biðið verður um, at frágreiðingin og skjølini verða umboðsmanninum í hendi innan 2 vikur..."*

Tann 1. oktober 2024 minti umboðsmaðurin Runavíkar kommunu á fyrispurningin.

Tann 3. oktober 2024 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar til fyrispurningin, sum umboðsmaðurin setti kommununi, tann 9. september 2024:

> *"Ja, prísurin sum vinnufyritøkur skulu gjalda fyri sethúsagrundstykki í B er 1.125,00 pr. fermeturin..."*

Sama dag, tann 3. oktober 2024, sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar til fyrispurningin, sum umboðsmaðurin setti kommununi, tann 23. september 2024:

> *"...*
>
> *Eg síggi í journalini, at G hevur fingið boðið stykki í B 24/10-2022, men hevur ikki tikið av.*
> *Eg dugi ikki at síggja hvør ella um nøkur serlig viðurskifti gera seg galdandi í samband við umsóknina um grundstykki – tað er ikki noterað í málið. Kanska okkurt munnligt samskifti hevur verið, men tað sæst ikki í málinum.*
> *Viðkomandi sum hevur umsitið sølu av grundstykkjum og bíðilistan til grundstykkir er ikki í starvi longur og undirritaða veit ikki meira um málið enn tað sum sæst í journalini..."*

Viðfest teldupostinum var avrit av skjali, har annar umsøkjari, tann 24. oktober 2022, fekk boðið grundstykki frá Runavíkar kommunu fyri 750 kr. fermeturin.

Umboðsmaðurin spurdi í hesum sambandi Runavíkar kommunu í telduposti, tann 21. oktober 2024, við 7 daga freist um, hvør orsøkin var til, at F og G fingu boðið grundstykkið til lægra kostnaðin í nýggju útstykkingini, meðan tey framvegis stóðu sum tinglýstir eigarar av aðrari kommunalt keyptari fastogn.

Tá Runavíkar kommuna ikki hevði svarað umboðsmanninum eftir eina áminning, metti umboðsmaðurin ikki neyðugt við víðari upplýsing av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina hjá Runavíkar kommunu í sambandi við, at klagarin søkti um grundstykki í nýggju útstykkingini B í Runavíkar kommunu. Viðgerðin er um ógreidleika í reglugerðini/mannagongdini fyri tillutan og prísáseting av kommunalum grundstykkjum, umframt ólíka viðgerð av borgarum, vantandi hoyring av klagaranum, viðgerðini av innlitsumbønini frá klagaranum og vantandi svari til klagaran.

Málsgongdin vísir, at Runavíkar kommuna tillutaði klagaranum eitt grundstykki til hægra kostnaðin, vísandi til, at umsóknin um grundstykki kom undir treytirnar fyri vinnustykki, har hægri prísur skuldi gjaldast, um borgari áður hevði fingið tillutað grundstykki frá kommununi, ella talan var um víðarisølu ella leigu. Sambært skjølunum, høvdu Fíggjarnevndin og Byggi- og býarskipanarnevndin tikið mál um sølu av grundstykkjum til vinnufyritøkur til viðgerðar á fundi, tann 28. mars 2022, og varð niðurstøðan tann, at vinnufyritøkur ella líknandi skuldu gjalda mettan útveganarkostnað fyri eitt grundstykki.

**Ógreidleiki í reglugerð fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu**
Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur ein myndugleiki altíð at hátta sær álitisvekjandi yvir fyri borgarum. Hetta inniber millum annað krav um greidleika og gjøgnumskygni yvir fyri borgarum, tá ein myndugleiki fyrisitur. Eisini eigur tilfar, sum myndugleikin nýtir at fyrisita eftir, og sum er atkomuligt fyri borgaran, at vera greitt orðað, so borgarin veit, hvør rættarstøða hansara er.

Runavíkar kommuna samtykti, tann 28. mars 2022, at kostnaðurin fyri grundstykki, sum verða seld vinnufyritøku til bygging av sethúsum ella líknandi, skuldi vera metti útveganarkostnaðurin hjá kommununi. Reglugerðin fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu er ikki dagførd í mun til hesa samtykt og hevur onga allýsing av, nær talan er um vinnustykki ella líknandi.

Runavíkar kommuna upplýsti klagaranum, tann 16. februar 2024, at kostnaðurin fyri grundstykki er 750 kr. fermeturin. Hevur ein borgari harafturímóti áður fingið tillutað kommunalt grundstykki, ella talan er um bygging til víðarisølu ella leigu, er kostnaðurin 1.125 kr. fermeturin.
Hesar treytir síggjast ikki ásettar í skrivligu reglugerðini, við tað at reglugerðin einans ásetir, at umsøkjarin ikki skal eiga kommunalt ella privat grundstykki í kommununi fyri at vera settur á listan.

Í frágreiðing til umboðsmannin, tann 3. mai 2024, vísti kommunan á, at klagarin í 2016 fekk tillutað grundstykki frá kommununi, sum klagarin hevði latið hús byggja á. Tí varð klagarin tikin við á grundstykkjalistan undir treytum fyri vinnustykki. Harumframt vísti kommunan á, at klagarin hevði kunnað um, at tað í øllum førum fóru at vera skattaborgarar, ið komu at búgva í húsinum, og metti kommunan tí, at henda útsøgn kundi bent á, at talan var um sølu ella leigu.

Runavíkar kommuna greiddi, tann 30. august 2024, umboðsmanninum frá, at umsøkjari, sum annaðhvørt eigur grundstykki, sum er keypt kommunalt, ella hús, sum umsøkjari hevur latið byggja á kommunalt keypt grundstykki, tá søkt verður um nýtt kommunalt grundstykki, ikki kann fáa tillutað nýtt kommunalt grundstykki. Umsøkjari, sum eigur grundstykki, sum er keypt privat í fríðari sølu, tá søkt verður um kommunalt grundstykki, kann heldur ikki fáa tillutað

kommunalt grundstykki. Hinvegin kann umsøkjari, sum eigur privat hús, sum umsøkjari antin hevur keypt sum liðugt bygd hús, ella sum umsøkjari hevur latið byggja á privat keypt grundstykki, tá søkt verður um kommunalt grundstykki, fáa tillutað kommunalt grundstykki. Hesar hesar treytir síggjast ikki ásettar í skrivligu reglugerðini.

Kommunan greiddi harumframt frá, at grundgevingin fyri treytunum var, at tá privat ogn verður keypt, verður goldin fullur kostnaður, meðan fullur kostnaður ikki skal gjaldast, tá kommunalt grundstykki verður tillutað. Hetta, tí har er ein innbygdur stuðul, tá ein borgari fær tillutað kommunalt grundstykki, og tann stuðulin kann borgarin bert fáa einaferð. Skrivliga reglugerðin sæst ikki hava áseting um, at kommunalt grundstykki einans kann keypast einaferð.

Soleiðis sum Runavíkar kommuna, tann 30. august 2024, hevur kunnað meg um mannagongdina fyri tillutan, tykist mannagongdin ikki at forða fyri, at stuðul verður latin fleiri ferðir. Hóast ætlanin ikki er at lata stuðul til kommunalt grundstykki meira enn einaferð til hvønn borgara, so tykist reglugerðin eitt nú ikki forða fyri, at stuðulin kann latast umaftur til sama borgara, um borgarin hevur selt tað fyrra kommunalt tillutaða grundstykkið við ella uttan ábygdum sethúsum.

Reglugerðin hevur, eftir míni meting, ikki nóg greiniligar ásetingar um treytirnar fyri at fáa tillutað grundstykki. Umboðsmaðurin hevur fingið kunning um mannagongdirnar fyri tillutan av grundstykkjum, so hvørt sum umboðsmaðurin hevur spurt kommununa undir málsviðgerðini. Upplýsingarnar síggjast tó ikki samlaðar í reglugerðini hjá kommununi. Hetta er, eftir míni meting, ikki nøktandi. Ein greið reglugerð eigur vera grundarlagið undir málsviðgerðini, og ein greið reglugerð er við til at tryggja, at mál, ið eru eins, verða viðgjørd eins.

**Ólíka viðgerð**
Sambært fyrisitingarligu líkaregluni eiga mál, ið eru eins, at verða viðgjørd eins.

Klagarin vísti á, at hann fekk at vita frá kommununi, at hann skuldi gjalda ein hægri kostnað fyri grundstykkið, tí hann átti hús í Runavíkar kommunu, tá hann søkti um grundstykki. Klagarin vísti á eina røð av borgarum, ið høvdu fingið tillutað grundstykki frá Runavíkar kommunu, hóast hesir, eins og hann, áttu hús, tá tey søktu um grundstykki frá kommununi. Klagarin kendi seg tí fyri mismuni.

Í reglugerðini eru ikki ásettar nágreiniligar treytir fyri tillutan av grundstykkjum. Tað var heldur ikki nærri nágreinað í samtyktini frá 28. mars 2022, hvat var fevnt av “ella líknandi”.

Umboðsmaðurin kannaði tí umstøðurnar fyri tillutan av grundstykkjum til teir borgarar, ið klagarin vísti á, høvdu fingið tillutað grundstykki, hóast hesir áttu hús, tá teir søktu um grundstykki.

Tað vísti seg, at flestu av hesum borgarum, ið høvdu fingið tillutað grundstykki, høvdu keypt ognirnar privat við ásettum sethúsum, tá teir søktu um grundstykki í nýggju útstykkingini. Hesir borgarar høvdu sostatt fingið tillutað grundstykki í samsvari við treytirnar, sum kommunan greiddi umboðsmanninum frá, tann 30. august 2024. Hetta var eisini galdandi fyri umsóknina hjá klagaranum.

Í tveimum førum vísti tað seg tó, at borgarar høvdu fingið boðið grundstykki Í B, Glyvrar, til lægra kostnaðin eftir samtyktina, tann 28. mars 2022, hóast hesir áttu kommunalt keypta ogn, tá teir søktu um nýtt kommunalt grundstykki.

Kommunan vísti á, at eini borgarin hevði selt húsini og keypt grundstykki í nýggju útstykkingini Í B. Sambært tinglýsingini, stóð hesin tó sum tinglýstur eigari av fyrru ognini, tá hann fekk høvi at keypa kommunalt grundstykki til lægra prísin. Hetta tykist ikki vera í samsvari við mannagongdina, sum kommunan hevur upplýst fyri umboðsmanninum. Eg gevi mær tó far um, at eldra ognin síðani er seld.

Í hinum førinum, hevði borgari fingið í boðið at keypa eitt grundstykki til lægra prísin, hóast borgarin stóð sum tinglýstur eigari av aðrari kommunalt keyptari ogn. Eg gevi mær tó far um, at hesin borgari ikki tók av tilboðnum at keypa.

Í hesum báðum førum tykist ikki vera umsitið í samsvar við mannagongdina, sum kommunan hevur upplýst fyri umboðsmanninum, við tað at borgararnir fingu tilboð at keypa til lægra prísin, hóast teir áttu kommunalt keypta ogn. Runavíkar kommuna hevur ikki givið eina frágreiðing um orsøkina fyri hesi frávik, og eg kann tí ikki meta um, hvørt talan er um saklig atlit fyri hesi ólíka viðgerð av borgarum.

Hetta er als ikki nøktandi fyrisiting.

**Vantandi hoyring**
Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini (Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg), eigur ein myndugleiki at hoyra partin í einum máli, tá myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, tá upplýsingarnar ikki eru til fyrimunar fyri viðkomandi part og hava stóran týdning fyri avgerðina av málinum.

Klagarin vísti í telduposti til Runavíkar kommunu, tann 17. desember 2023, á telefonsamrøðu við Runavíkar kommunu, tann 20. november 2023, at hann ikki skilti, at Runavíkar kommuna setti spurnartekn við ætlanina hjá honum viðvíkjandi einum grundstykki.

Runavíkar kommuna vísti í frágreiðing síni, tann 3. mai 2024, á, at klagarin hevði kunnað um, at tað í øllum førum fóru at vera skattaborgarar, ið komu at búgva í húsinum, og metti kommunan, uttan at hoyra borgaran, at henda útsøgn kundi bent á, at talan var um sølu ella leigu.

Eg undrist á, at kommunan yvirhøvur hevur mett um, hvørt útsøgnin hjá klagaranum kundi bent á, at talan er um sølu ella leigu. Hetta, tí kommunan hevur greitt mær og klagaranum frá, at ein borgari, sum eigur kommunalt keypta ogn, tá søkt verður um grundstykki, kann ikki fáa tillutað grundstykki frá kommununi til lægra kostnaðin. Longu av teirri orsøk var metingin um sølu ella leigu ikki neyðug.

Av somu orsøk geri eg ikki meira við hendan partin av málinum.

**Innlitsumbønin**
Sambært § 16, stk. 1 og 2 í innlitslógini (Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001), eigur ein myndugleiki sum

skjótast at gera av, um ein áheitan um innlit kann vera gingin á møti. Um ein áheitan um innlit ikki er gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Klagarin bað, tann 20. juni 2023, um innlit í, hvussu grundstykkini vórðu útlutað. Kommunan gav klagaranum noktandi svar, tann. 27. juli 2023. Tað er ikki í samsvari við § 16, stk. 1 og 2, at kommunan svaraði umbønini meir enn ein mánað eftir, at klagarin bað um innlit.

Sambært § 21 í fyrisitingarlógini, eigur ein avgerð, sum verður fráboðað skrivliga, og sum ikki gongur partinum til fulnar á møti, at hava eina grundgeving. Hóast talan í hesum føri var um alment innlit eftir innlitslógini, var talan um eina fyrisitingarliga avgerð, sum átti at hava eina grundgeving við tilvísing til viðkomandi áseting í innlitslógini.

Kommunan sýtti fyri innlitinum einans vísandi til, at grundstykkjalistin ikki var almennur.
Hetta var ikki ein nøktandi grundgeving, sambært § 21 í fyrisitingarlógini. Kommunan átti at víst á, hvør heimildin fyri sýtan var, sambært innlitslógini, eins og kommunan eitt nú átti at umhugsa meirinnlit.

**Málsviðgerðartíð og vantandi svar**
Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur ein myndugleiki at svara borgarum innan rímiliga tíð.

Í tíðarskeiðnum 25. august 2023 – 18. oktober 2023, 20. oktober 2023 – 19. november 2023 og 21. november 2023 – 15. februar 2024 fekk klagarin onki svar frá Runavíkar kommunu til skrivligu fyrispurningar sínar um grundstykki. Klagarin segði seg einans hava havt telefonsamskifti við Runavíkar kommunu tann 19. oktober 2023 og 20. november 2023.

Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at klagarin ikki fekk svar til fyrispurningar sínar yvir so langa tíð.

**Samanumtikið**
Eg fari samanumtikið at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina av umsókn klagarans um grundstykki, herundir fyri ikki at hava eina nóg greiða reglugerð fyri tillutan av kommunalum grundstykkjum og fyri at sýna til ólíka viðgerð av borgarum við í tveimum førum ikki hava hildið egnar mannagongdir í sambandi við tillutan av kommunalum grundstykkjum.

Harumframt fær kommunan eina átalu fyri viðgerðina av innlitsumbøn klagarans og fyri ikki at hava givið klagaranum svar til skrivligu fyrispurningar hansara innan rímiliga tíð.

Eg fari at heita á Runavíkar kommunu um beinanvegin at dagføra og eftirmeta reglugerðina fyri tillutan av kommunalum grundstykkjum soleiðis, at treytirnar fyri tillutan eru greiðar og samsvara við fyrisitingarrættarligu líkaregluna.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður